# Telja upp í 10

Stutt vegleiðing um, hvussu spælt verður.

**At telja upp í 10 er eitt stuttligt spæl, har øll kunna vera við og eitt spæl, sum kann spælast allastaðni.**

Ein luttakari verður valdur at verða tann fyrsti sum telur.

Allir hinir luttakararnir stilla seg einar 20 metrar burtur frá tí, sum telur.

Tann sum skal telja vendir bakið móti hinum og byrjar at telja upp í 10 innantanna.

Meðan hann telur, kunnu hini renna nøkur fet fram í móti honum. Tá ið hann er liðugur at telja, skundar hann sær at venda sær við. Tað ræður um, at standa pinnastillur, tá teljarin vendir sær við. Um tann, ið talt hevur, sær nakran flyta seg, skal viðkomandi flyta seg aftur á staðið har byrjað varð. Hini verða standandi har tey eru.

Spælið endurtekur seg, til ein av luttakarunum er komin framm um tann sum telur. Tann sum fyrst kemur framm um tann sum telur, hevur vunnið spælið og er samstundis tann, sum skal telja í næsta spæli.



GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 · Postboks 132 · 110 Tórshavn · Tlf:562 300 · www.gigni.fo